## Republikanar hava skyldina

Á einum fundi við demokratiskar senatorar í gjár viðgekk Barack Obama, forseti, at hann hevur ikki dugað nóg væl at selja sína ætlan um nýskipanir innan heilsuøkið. Hann segði, at bardagin er ikki taptur kortini, og hann eggjaði sínum floksfeløgum til at leggja alla orku í at fáa lógirnar ígjøgnum Kongressina. Obama segði, at fara nýskipaninar fyri bakka, hava republikanararnir skyldina. Hann segði, at demokratarnir høvdu rætt republikanarunum hondina, men høvdu fingið ein knýttan neva frá mótpartinum.



## 100 aftur í fongsli

Í Haiti hevur løgreglan tikið 100 av teimum umleið 4.000 fangunum , sum flýddu úr fongslinum í høvuðsstaðnum Port-au-Prince undir jarðskjálvtanum tann 12. januar. Talsmaðurin hjá løgregluni, Frantz Lerebours, sigur, at teir 100 fangarnir høvdu fjalt seg ymsastaðni í landinum, og at løgreglan leitar nú eftir hinum. Talsmaðurin sigur, at fleiri av teimum fangunum, sum eru leysir enn, hava fingið dóm fyri eitt nú dráp neyðtøku og dráp. Myndugleikarnir í Haiti søgdu í gjár, at teir hava skrásett meiri enn 200.000 deyð eftir jarðskjálvtan.

# um vit gerast nikkudukkur



*- Um Føroyar bara halda fast um sína fiskidagaskipan, og eingi verulig stig taka, tá tað gongur niður á bakka við ávísum fiskastovnum, fer eingin at trúgva, at vit hava eina burðardygga fiskiveiðiskipan, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

hevur síni lýti. Fiskidagaskipanin skal haldast við líka, og eg haldi, at tað hevur slett ikki verið gjørt, síðan skipanin varð sett á kjøl.

### Eisini í 40 ár

Vit venda nú í stuttum aftur til kanningarroyndir og royndir í fiskiveiði.

Olaf Olsen, sum vit høvdu samrøðu við í Sosialinum í dag, var skipari, áðrenn hann gjørdist reiðari. Hann hevur eisini verið við í politikki í nógv ár, og eitt skifti var hann eisini landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Sum reiðari hjá Beta í mong ár, situr hann á óteljandi skjølum ígjøgnum øll árini, síðan sonevndu Kubatrolararnir komu til landið og fóru til fiskiskap.

Hjalti í Jákupsstovu hevur stóra virðing fyri manninum og tí verki, sum hann hevur útint innan føroyska fiskiskipavinnu.

– Men eg havi so sanniliga eisini mínar royndir, og eg havi eisini fingist við fiskiveiði í 40 ár. Áðrenn eg fór at lesa, var eg sjómaður, og øll hesi árini, síðan eg kom heimaftur, havi eg arbeitt við fiskiveiði, kanningum og hagtølum. So, eg haldi meg hava líka nógv skil fyri fiskiveiði sum Olaf Olsen. Munurin á okkum báðum er, at meðan eg havi sitið á kanningarsíðuni, hevur hann sitið á veiðimanssíðuni, leggur hann aftrat.

> *"... tað er ikki kvotur, vit vilja hava aftur. Fiskidagaskipanin er góð, men vit skulu bara vit, at hon hevur síni lýti. Skipanin skal haldast við líka, og tað hevur slett ikki verið gjørt..."*
>
> *Hjalti í Jákupsstovu*

### Eitt ávíst trýst

Vit spurdu eisini, um Havstovan kennur tað, sum frammi hevur verið um stongsul á bretska hýsumarknaðinum, sum eitt ávíst trýst, nú handilsketur hanga seg í, at okkara hýsuveiða ikki er burðardygg.

– Jú, sjálvandi gera vit tað, men vit kunnu ikki gera hetta øðrvísi. Tað má ongantíð gerast soleiðis, endurtekur Hjalti í Jákupsstovu, at Havstovan gerst ein nikkudukka hjá vinnuni, tí tá er alt álit á stovnin úteftir fokið.

Fráfarandi kapasiteturin á Havstovuni, sum nú letur eftirmanni sínum stýrisvølin, sigur, at eitt, sum hevur havt stóran týdning fyri kanningararbeiði hjá Havstovuni seinastu 20 árini, er gróðurkanningarnar.

– Tað var eftirmaður mín, Eilif Gaard, sum byraði hetta verk, og tað er hann, sum hevur fylgt tí upp øll árini. Tað er hann, sum hevur fingið hesi góðurtøl yvir æti á landgrunninum upp at standa, og hesi hava stóran týdning fyri okkara metingar.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at tá toskurin var burtur fyrst í nítiárunum, men síðan fekst aftur í stórum tali fá ár seinni, vóru gróðurkanningarnar byrjaðar bert eini fýra ár frammanunan.

Hann heldur, at fiskifrøðin tá hevði dugað betri at mett um gongdina frameftir, um hesi hagtøl vóru kend fleiri ár frammanundan.

– Nú hava vit so hesi tøl og hava soleiðis eisini eitt gott barometur aftrat at meta um útlit frameftir, sigur hann.

At enda í samrøðuni sigur fráfarandi stjórin á Havstovun seg onga løtu ivast í, at føroysk fiskiveiða hevði verið meiri lønandi, um betri hevði verið lurtað eftir fiskifrøðini, enn gjørt hevur verið gjøgnum mong ár. Hetta hevði so eisini ført til, at Føroyar høvdu umgingist tann stongsul, sum nú er á bretska hýsumarknaðinum, sigur Hjalti í Jákupsstovu.